klaksvíkar kommuna
Postboks 2
FO-710 KLAKSVÍK
FØROYAR
e-mail: klaksvik@klaksvik.fo
Telefon (+298) 410000
Telefax (+298) 410001

21/01969-6

*Klaksvík, 29. september 2022*

**Reglugerð fyri víðarisølu av útgrivnum kommunalum grundstykkjum**

Eigari av kommunalum grundstykki, ið er partvís ella liðugt útgrivið kann søkja kommununa um at fáa loyvi til víðarisølu.

Støða A:

*Eigari av grundstykkinum kann skjalprógva útreiðslur sínar.*

Søluupphæddin verður ásett út frá upprunaliga kommunala søluprísinum og prógvaðum útreiðslum í samband við arbeiðstøku, tó uttan rentur ella annan kostnað, ið stendst av láns-, rakstrar-, fyrisitingar-, arkitekta- ella ráðgevaraútreiðslum.

Tilsøgn um játtan til víðarisølu verður latin av Klaksvíkar býráð.

Støða B:

*Eigari av grundstykki hevur ikki møguleika at skjalprógva útreiðslur sínar.*

Søluupphæddin verður ásett út frá upprunaliga kommunala søluprísinum. Er ikki møguligt at prógva útreiðslur í samband við arbeiðstøku, er møguligt at fáa grundstykkið mett hjá skikkaðum metara (byggikønur). Tað er Klaksvíkar kommuna, ið vísur á møguligar uttanhýsis metarar, ið seljari kann velja at fremja skoðanina.
Eigari og kommunan skulu góðkenna metara, áðrenn sjálv metingin fer fram. Eigari ber kostnaðin av meting. Endaliga metingin skal góðkennast av eigara og kommunu, áðrenn avgerð um mett virði er staðfest.

Metingin skal, í tann mun tað letur seg gera, taka støði í, hvat arbeiðstøkan hevur kostað, tá ið hon varð framd.
Metingin tekur ikki støði í rentu- ella øðrum kostnað, ið stendst av láns-, rakstrar-, fyrisitingar-, arkitekta- ella ráðgevaraútreiðslum.

Tilsøgn um játtan til víðarisølu verður latin av Klaksvíkar býráð.

Almennar reglur:

Tá ið játtan er latin av Klaksvíkar býráð, kann eigari seta grundstykkið til sølu. Søluprísurin kann ongantíð vera hægri enn játtaði søluprísurin frá býráðnum.

Henda reglugerð umfatar einans kommunal grundstykkir, sum av fyrstan tíð eru seld óútgrivin.*

Í serligum føri kann kommunan taka útgrivin grundstykkir inn og lata endurgjald eftir omanfyri nevndu treytum, um serligar umstøður tala fyri tí, til dømis um kommunan sjálv hevur ætlan við stykkinum.

Nevndu reglur eru galdandi fyri víðarisølu av útgrivnum kommunalum grundstykkjum hjá Klaksvíkar kommunu og verða stýrdar umsitingarliga, men játtan verður latin av Klaksvíkar býráð.

Henda reglugerð er samtykt á býráðsfundi 29. sep. 2022.

*Grundstykkir í útstykkingini á Fossum eru ikki umfatað av hesi reglugerð, tí tey verða seld útgrivin og byggibúgvin.

*Karl H. Johansen*
*Borgarstjóri*